**Sonja J. Jógvansdóttir**
**Bjørt Samuelsen**
**Hanna Jensen**
**Kristianna Winther Poulsen**
**løgtingskvinnur**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 19/2015: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar partar av broytingum í hjúnabandslógini og rættarvirknaðarlógini**

**Uppskot til**

**ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar partar av broytingum í hjúnabandslógini og rættarvirknaðarlógini**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta soljóðandi uppskot til kongliga fyriskipan í gildi fyri Føroyar:

**Anordning om delvis ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, lov om ægteskabets retsvirkninger og retsplejeloven og om ophævelse af lov om registreret partnerskab**

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 6[1] i lov nr. 532 af 12. juni 2012 om ændring af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, lov om ægteskabets retsvirkninger og retsplejeloven og om ophævelse af lov om registreret partnerskab bestemmes, at loven skal gælde for Færøerne i følgende affattelse:

**§ 1**

I lov nr. 37 fra 22. januar 2002 om ægteskabs indgåelse og opløsning, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010, foretages følgende ændringer:

**1.** Overskriften til *kapitel 1* affattes således:

*»Lovens anvendelsesområde samt ægteskabsbetingelser«.*

**2.** *§ 1* ophæves, og i stedet indsættes:

---

[1] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Stk. 1. Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, jf. dog stk. 2.
*Stk. 2.* Loven, bortset fra § 3, kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de færøske og grønlandske forhold tilsiger."

”**§ 1.** Loven finder anvendelse på ægteskab mellem to personer af forskelligt køn og borgerligt ægteskab mellem to personer af samme køn.

**§ 1a.** Den, som er under 18 år, må ikke indgå ægteskab uden Rigsombudsmandens tilladelse. Rigsombudsmanden kan ved meddelelse af tilladelse til indgåelse af ægteskab til en ung under 18 år fastsætte vilkår om, at den unge trods ægteskabet fortsat er mindreårig og dermed umyndig indtil det fyldte 18. år.”

**3.** (sættes ikke i kraft for Færøerne)
**4.** (sættes ikke i kraft for Færøerne)
**5.** (sættes ikke i kraft for Færøerne)

**6.** Overskriften til *kapitel 6* affattes således:

*»Ikrafttrædelsesbestemmelser, internationale forhold m.v.«*

**7.** Efter § 54 indsættes:
»**§ 66a.** Bestemmelser i internationale overenskomster finder ikke anvendelse på ægteskab mellem to personer af samme køn, medmindre medkontrahenterne tilslutter sig dette.«

**§ 2**

I lov om ægteskabets retsvirkninger, jf. Lov nr. 56 af 18. marts 1925, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010 foretages følgende ændring:

**1.** Efter § 53 indsættes i *kapitel 7:*

»**§ 53b.** Bestemmelser i den for Færøerne gældende lovgivning, der indeholder særlige regler om den ene part i et ægteskab, bestemt ved dennes køn, finder ikke anvendelse på ægteskab mellem to personer af samme køn.
*Stk. 2.* Bestemmelser i internationale traktater finder ikke anvendelse på ægteskab mellem to personer af samme køn, medmindre medkontrahenterne tilslutter sig dette.«

**§ 3**

(sættes ikke i kraft for Færøerne)

**§ 4**

*Stk. 1.* Anordningen træder i kraft den 1. juli 2016.
*Stk. 2.* (sættes ikke i kraft for Færøerne)

**§ 5**

(sættes ikke i kraft for Færøerne)

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**
Endamálið við hesum uppskoti er at gera tað møguligt hjá samkyndum at ganga saman í borgarligt

hjúnalag.

Stundin er nú komin til, at Føroyar dagføra lóggávuna, so samkynd og hinskynd verða javnsett í mun til borgarlig rættindi, eisini í hjúnabandslóggávuni. Við at mæla til lógarbroytingina, sum verður lagað til føroysk viðurskifti, tryggja vit, at øll, uttan mun til aldur, kyn, uppruna, trúgv, sosiala støðu og kynsliga sannføring og samleika, skulu hava javnsett borgararættindi at liva og virka í Føroyum.

Sama lóg varð løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 2013, men tá fall uppskotið. Rættindi hjá samkyndum hava fylt nógv í almenna rúminum seinastu árini. Tað eru 9 ár síðani, at grein 266b varð broytt til eisini at verja fólk samsvarandi kynsligari sannføring. Kjakið um samkynd hevur mangan verið hvassorðað, men tað hevur verið neyðugt. Um hugt verður 10 – 15 ár aftur í tíðina, sæst ein grundleggjandi øðrvísi hugburður enn í dag. Spurningarnir tá vóru, hvørt samfelagið skuldi nevna og rúma samkyndum, meðan tað í dag verður viðgjørt, hvussu samkynd – eins og øll onnur – kunnu vera partur av samfelagnum og lóggávu landsins.

Galdandi lóggáva á hjúnabandsøkinum er "Anordning nr. 37 frá 22. januar 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, sum seinast varð broytt við Anordning nr. 398 frá 20. april 2010". Henda lóggáva gevur bert hinskyndum møguleikan at ganga saman í hjúnalag. Henda avmarking er ótíðarhóskandi og ikki sømilig fyri eitt framkomið samfelag sum tað føroyska.

Lond um stóran part av heiminum hava síðan áttatiárini støðugt ment og broytt lóggávuna á hesum øki.

Okkara næstu grannar hava, eins og mong onnur lond, sett í gildi antin fullkomna ella nærum fullkomna javnstøðu millum samkynd og hinskynd í hjúnabandslóggávuni. Í hesum londum kunnu pør av sama kyni ganga saman í hjúnalag við somu rættarligu avleiðingum, sum pør av hvør sínum kyni.

Í øðrum londum ber til at ganga saman í skrásett parlag. Gongdin hevur verið, at skrásetta parlagið í fleiri londum verður avloyst av hjúnabandslógini, so at øll eru fevnd av somu lóg. Fyri samkynd hevur tað týdning at kunna vera partur av lóggávuni í landinum, og tískil ynskja samkynd ikki serlógina "skrásett parlag", men at vera partur av hjúnabandslóggávuni sum karmur um parlagið.

Danmark var í 1989 fyrsta land, sum gav samkyndum formlig parlagsrættindi. Fyrst við lóg nr. 372 frá 7. juni 1989 um skrásett parlag, ið bar í sær, at rættarligu avleiðingarnar av einum skrásettum parlagi í stóran mun kundu javnsetast við rættarligu avleiðingarnar, tá hinskynd pør gingu saman í hjúnalag. Síðan er lóggávan í Danmark ment og broytt. Við lóg nr. 532 frá 12. juni 2012 um broyting av lóg um "ægteskabs indgåelse og opløsning, lov om ægteskabets retsvirkninger og retsplejeloven og om ophævelse af lov om registreret partnerskab" varð lógin um skrásett parlag tikin av og hjúnabandslógin broytt soleiðis, at tað gjørdist møguligt hjá samkyndum at ganga saman í hjúnalag.

Uppskotssetararnir mæla til, at tað í hjúnabandslóggávuni í Føroyum skal vera staðfest, at lógin ásetir, at borgarligt hjúnalag er galdandi fyri tveir persónar av sama kyni.

Broytingarnar í lóggávuni fevna ikki um rættin hjá samkyndum at verða vígd í kirkju. Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at meðan "Indgåelse af ægteskab" er eitt familjurættarmál og sostatt eitt felags málsøki, er kirkjumál eitt yvirtikið málsøki.

Samanumtikið føra lógarbroytingarnar til:

- At tvey fólk av sama kyni kunnu verða borgarliga vígd.
- Broyting av "retsvirknings" lógini víðvíkjandi teimum rættarligu avleiðingum av borgarligari vígslu millum tveir persónar av sama kyni.
- Fylgilógaruppskot, so lóggivið ikki verður inn um kirkjugátt í mun til vígslu og vælsignilsi av borgarliga vígdum samkyndum hjúnum og broyting í føroysku rættargangslógini.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær nakrar serligar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Uppskotið kann møguliga hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið í mun til lógarásettar skyldur ella rættindir.

Uppskotið hevur ikki nakrar serligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Heldur ikki hevur uppskotið nakrar avleiðingar fyri umhvørvið ella vinnuna.

Uppskotið kann hava umsitingarligar avleiðingar fyri kommunalar myndugleikar, tí talið av borgarligum vígslum kann hugsast at hækka.

Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri samkynd, ið fáa styrkt teirra rættarligu støðu við javnsettum rætti at ganga saman í borgarligt hjúnalag.

| | Fyri landið/ landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar /búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða Reglur og avtalur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Galdandi hjúnabandslóggáva í Føroyum er gjørd við støði í, at hjúnalagið bert er fyri persónar av hvør sínum kyni.

Í Føroyum er tískil ikki møguligt hjá persónum av sama kyni at ganga saman í hjúnalag.
Mælt verður til, at vit í Føroyum partvís seta í gildi samtykta broytingaruppskotið í hjúnabandslóggávuni í Danmark soleiðis, at tann galdandi hjúnabandslógin í Føroyum verður broytt. Tað viðførir, at ein nýggj grein skal innlimast í ta fyri Føroyar galdandi lóggávu, sum fevnir um hjúnalag millum persónar av ymiskum og sama kyni.

Tá staðfest verður í hjúnabandslógini, at hon fevnir um hjúnalag millum pør av ymiskum og sama kyni, verður tað eisini staðfest, at tað er gjørligt hjá pørum av sama kyni at verða gift borgarliga.

Til nr. 1-2: Mælt verður til, at broytingaruppskotið lutvíst verður staðfest í Føroyum við teimum broytingum, sum tey serligu føroysku viðurskiftini viðføra. Tískil verður mælt til, at kapittul 1 í galdandi føroysku hjúnabandslógini verður víðkað til eisini at fevna um eina áseting, sum sigur, hvønn lógin fevnir um. Hjúnalagið hevur higartil í lógini sum hugtak bert fevnt um pør av ymiskum kyni. Fyri at gera tað møguligt hjá persónum av sama kyni at ganga saman í hjúnalag, verður mælt til, at tað verður staðfest í lógini, at hon fevnir um hjúnalag millum tveir persónar av ymiskum kyni og tveir persónar av sama kyni. Ásetingin, ið fer at gera tað møguligt hjá pørum av sama kyni at ganga saman í hjúnalag, verður skoytt upp í kapittul 1 í einari nýggjari § 1, sí lógaruppskot § 1, nr. 2. Harvið verður tað gjørligt hjá pørum av sama kyni at ganga saman í hjúnalag við einari borgarligari vígslu.

Yvirskriftin til kapittul 1 verður víðkað til eisini at fevna um »lovens anvendelsesområde«. Galdandi § 1 í hjúnabandslógini um treytir fyri hjúnalagi millum persónar undir 18 ár verður varðveitt óbroytt, men verður til § 1a.

Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar.

Til nr. 3: Broytingin verður ikki sett í gildi í Føroyum, tí hon er óneyðug.

Til nr. 4: § 43a, stk. 1 er ikki sett í gildi í Føroyum.

Til nr. 5: § 58b, stk. 1 er ikki sett í gildi í Føroyum.

Til nr. 6 og 7: Yvirskriftin í kapitli 6 í hjúnabandslógini verður broytt til: »Ikrafttrædelses-bestemmelser, internationale forhold m.v.« Kapittulin hevur eina myndugleikaáseting í § 54 um, at tað í sáttmála við fremmandan stat ella avvarðandi ráðharra kunnu verða ásettar reglur fyri viðurskiftinum millum ta fyri Føroyar galdandi lóggávu og lóggávuna hjá øðrum stati viðvíkjandi staðfesting og upploysn av hjúnalagi.

**Til § 2**
Samkynd í Føroyum hava hvørki møguleika fyri borgarligari vígslu ella skrásettum parlagi, og er økið tískil ikki skipað í Føroyum.

Møguleikin fyri borgarligum hjúnalagi millum samkynd verður nú staðfestur í hjúnabandslógini, og í "retsvirkningsloven (lov om ægteskabets retsvirkninger, jf. Lov nr. 56 af 18. marts 1925, sum seinast broytt við anordning nr. 398 af 20. april 2010 )" verður staðfest, at "bestemmelser i den for Færøerne gældende lovgivning, der indeholder særlige regler om den ene part i et ægteskab, bestemt ved dennes køn, ikke finder anvendelse på et ægteskab mellem to personer af samme køn, og at bestemmelser i internationale traktater ikke finder anvendelse på ægteskab mellem to personer af samme køn, medmindre medkontrahenten tilslutter sig dette".

Hetta inniber, at sum avleiðing av, at tað verður gjørligt hjá persónum av sama kyni at ganga saman í borgarligt hjúnalag, verður sett ein áseting í føroysku lov om ægteskabets retsvirkninger soleiðis, at ásetingar í lógum, sum fevna um serligar reglur um annan partin í einum hjúnalagi, har kynið er avgerandi, ikki verða galdandi viðvíkjandi hjúnalagi millum tveir persónar av sama kyni. Harafturat verða ásetingar í altjóða sáttmálum ikki brúktar til borgarligt hjúnalag millum tveir persónar av sama kyni, uttan so, at sáttmálapartarnir góðtaka hetta.

**Til § 3**
Eingin heimild er fyri at seta § 3 í gildi í hesum uppskoti. Tískil verður fylgibroytingin í føroysku rættargangslógini sett fram í einum sjálvstøðugum uppskoti.

**Til § 4**
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. juli 2016 soleiðis, at hædd verður tikin fyri fyrireikingartíð til at seta lógina í gildi fyri Føroyar eftir, at Løgtingið hevur samtykt málið.

**Til § 5**
Lóg um skrásett parlag hevur ongantíð verið galdandi fyri Føroyar.

**Á Løgtingi, 17. november 2015**

| | |
|---|---|
| **Sonja J. Jógvansdóttir** | **Bjørt Samuelsen** |
| **Hanna Jensen** | **Kristianna Winther Poulsen** |

**Hjáløgd fylgiskjøl:**
**Fylgiskjal 1:** Lov om ændring af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, lov om ægteskabets retsvirkninger og retsplejeloven og om ophævelse af lov om registreret partnerskab nr. 532 af 12/06/2012.

**Fylgiskjal 2:** Forslag til Lov om ændring af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, lov om ægteskabets retsvirkninger og retsplejeloven og om ophævelse af lov om registreret partnerskab med bemærkninger til lovforslaget.